einfaldari
- ger tað einfaldari
Oktober 2011

# Altjóða leiðarastevnan 2011



Altjóða leiðarastevnan The Global Leadership Summit 2011 verður í Norðurlandahúsinum dagarnar 21. og 22. oktober.

Sjálv leiðarastevnan varð hildin í Chicago dagarnar 11. og 12. august 2011. Tað eru talarar á hesi stevnuni, ið koma at hava sínar framløgur, sum verða sýndar á stórskíggja í Norðurlandahúsinum.

Talan er um nógvar spennandi og áhugaverdar vinnulívsleiðarar, leiðarar í kirkjum og samkomum, rithøvundar og persónar, sum hava gjørt stórt hjálpararbeiði millum fátøk og neyðstødd.

Í ár verður The Global Leadership Summit í umleið 300 býum í fleiri enn 60 londum, har yvir 100.000 leiðarar frá fleiri enn 10.000 kirkjum og samkomum møta til at fáa íblástur, vegleiðing og førleikamenning. Til ber at melda seg til og gjalda á www.gls.fo

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Eitt friðarheim

Sangurin "Eitt friðarheim" lýsir, fram um alt annað, nøkur av kjarnuvirðunum, sum samkoman Lívdin hevur.

Tá Lívdin byrjaði í 2001, vórðu nakrar av hugsjónunum, at Lívdin skuldi vera ein samkoma, har tey niðurboygdu, hjartabrotnu og vónleysu kundu finna kærleika, náði og lívd. At samkoman kundi vera eitt stað, har børn, foreldur, støk, hjún, eldri, ung, kvinnur og menn saman kundu tilbiðja Gud og ganga lívsleiðina hvør við øðrum. Ymiskt er, hvussu fólk hava upplivað hetta, men fyri mong hevur Lívdin verið eitt satt friðarheim seinastu tíggju árini.

Høvuðsendamálið hjá Lívdini og høvuðsboðskapurin í sanginum "Eitt friðarheim" er, at tann sanna lívdin er ikki ein samkoma, men ein persónur – Jesus Kristus.

Frá fyrsta degi hevur evangeliið um Jesus Kristus verið kunngjørt á ein náðiríkan og viðkomandi hátt, og mong hava funnið sína sonnu lívd hjá Honum.



Lívdin vónar, at hesin sangur fer at hjálpa mongum at finna sítt sanna friðarheim í Jesusi, og at tey støðugt skulu hoyra rødd hansara siga: "Hvíl hjá Mær".

*Jógvan Zachariassen*

* Sangin “Eitt friðarheim" gjørdi Regin Guttesen til 10 ára haldið hjá Lívdini.

# HENDINGAR & TILTØK

## Skeið um reinleika

Hey dreingir og menn! HAGNOS byrjar tann 17. oktober í Lonini Oman Hoydalar 28.

HAGNOS er eitt skeið, sum er rættað ímóti reinleika. Í okkara samfelag, har sex og ómoralur er økjandi, er tað umráðandi at undirvísa í, hvat Jesus og Hansara orð sigur um hetta evnið. Torir tú at blíva tað, sum tú vart skaptur til?

Vilt tú vita meira, kanst tú seta teg í samband við Arnold Jacobsen tlf. 502044 ella Noe Chaparro tlf. 272641.

## Til lukku við próvnum



Anja Rein hevur seinastu tvey árini tikið eina Master í leiðslu, og fekk hon prógvið 7. oktober 2011.

Anja starvast í Bank-Nordik sum leiðari í Privatláni. Vit ynskja Anju til lukku við próvnum.

## Ísraelsferð í februar



Lofti-ferðir skipa fyri einum túri til Ísraels í døgunum 9.–21. februar 2012 við Marner av Lofti og Jógvan Zachariassen sum ferðaleiðarum.

Marner og Jógvan siga, at teir hava valt ferðamálini, gistingarstøðini, bussførara og ferðaleiðarar í Ísrael sera nágreiniliga og hava gjørt alt fyri at kunna ferðast á besta hátt í Heilaga landinum.

Tekning fer fram á hesum mailadressum: marneravlofti@gmail.com, jogvanz@gmail.com ella www.loftiferdir.fo

Seinasta freist at tekna seg er 16. desember 2011.

## Gloymdir lutir




*Mynd: Tórvør Vang*

Gloymdir lutir eru við at hópa seg upp í rúminum hjá Lívdini í Skúlanum við Løgmannabreyt. Har eru t.d. fleiri bíbliur, húgvur, troyggjur, jakkar, handskar, skógvar og aðrir smálutir. Tað hevði verið gott, um fólk í samkomuni hugdu í kassan við gloymdum lutum. Kanska er okkurt har, sum tey sakna.

## Christmas Child í SMS




Um tú ynskir at gleða eitt fátækt barn, so kanst tú geva tí eina jólagávu í ár. Á www.christmaschild.fo fæst alt at vita um, hvussu tú kanst gera. Gávuna kanst tú lata inn í SMS týsdagin 1. november millum kl. 10-18. Vit eru á Torginum, har m.a. filmar frá arbeiðnum hjá Christmas Child verða vístir.

Christmas Child er eitt hjálpararbeiði, sum hevur til endamáls at geva fátækum børnum eina gávu, soleiðis at tey kunnu uppliva, at onkur hugsar um tey. Tað eru fleiri milliónir børn kring heimin, sum ikki hava tað gott og sum ongan góðan eiga. Tá hesi børn fáa eina gávu uttan treytir, kann tað skapa eina gleði og vón í teirra hjarta.

Hetta er nýggjunda árið, at skipað verður fyri hesum tiltaki í Føroyum. Í fjør vórðu 4850 eskjur sendar úr Føroyum.

## Minibíbliuskúli og bønarmøti

Minibíbliuskúli er týskvøld í Lonini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður minibíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti.

**Skráin fyri týskvøldini oktober 2011**

Týskvøldið 4. oktober
Hvat gjørdi læru Jesusar so radikala?

Týskvøldið 11. oktober
Kyknubólkar
(Lonin er opin til bøn og samveru frá kl. 20.30)

Týskvøldið 18. oktober
Standa vit undrandi um undur Jesusar?

Týskvøldið 25. oktober
Skulu vit altíð vera sum Jesus?

## Mammubólkur í Lonini

Mikudagin 5. oktober byrjaði ein mammubólkur í Lonini. Eftir ætlan verður hesin mammubólkur hvønn hósdag kl. 10. Næsti mammubólkurin verður hósdagin 20. oktober.

Alice Mortensen, sum skipar fyri hesum mammubólki, sigur, at brúk er fyri góðum leikum til børnini at spæla við, so um onkur eigur leikur, sum ikki verða brúktar meira, eru tey vælkomin at siga sær frá. Alice hevur telefon 27 69 62.

## Breiðband í Lívdini



*Mynd: Tórvør Vang*

Sunnudagin 18. september spældi bólkurin "Breiðband" í Lívdini. Teir sum manna bólkin eru Ejler Eysturún, Høgni Háberg Hansen, Rúni Højgaard, Magni á Lakjuni og Ken Nónklett.

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 2. oktober**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Vitnisburður hjá Tórhild Bærentsen (samrøða)
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Kvinnan er undir manninum?
Talari: Jógvan Zachariassen

Tórhild



**Sunnudagin 9. oktober**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Jens Wang sigur frá
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Kvinnur í Gamla Testamenti
Talari: Jógvan Zachariassen



Jógvan

**Sunnudagin 16. oktober**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Unn Zachariassen sigur frá
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 12.00: Talari: Anja Nielsen

**Sunnudagin 23. oktober**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Sunnudagsskúlin framførir
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Kvinnur í Nýggja Testamenti
Talari: Jógvan Zachariassen



Unn

**Sunnudagin 30. oktober**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Christmas Child
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Kvinnan skal ikki læra?
Talari: Jógvan Zachariassen

**Ungdómstiltøk:**
Alive: leygarkvøld kl. 21.00



Anja

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*